# Miðlahúsið viðger umstøður hjá deyðasjúkum

**Í eini greinarøð 23., 26. og 27. mars viðgjørdi Sosialurin umstøðurnar hjá deyðasjúkum í Føroyum. Í hesum sambandi varð gjørt vart við, at greinarøðin skuldi fylgjast upp við einum pallborðskjaki í Miðlahúsinum í Vágsbotni.**

Pallborðskjakið er sett til mikukvøldið 11. apríl kl. 19 undir evninum: »Umstøður hjá deyðasjúkum í Føroyum«. Øll eru vælkomin til pallborðsfundin at líða á ella seta spurningar til luttakararnar við pallborðið. Tey eru: Jákup N. Olsen, formaður, Sjúklingaráðið, Kathrina Lindenskov Joensen, sálarfrøðingur, Mary J. í Garði, stjóri, Nærverkið, Marin Vang, sj úkrarøktarfrøðingarstjóri, Landssjúkrahúsið, Erik Wandall, yvirlækni, Landssjúkrahúsið og Hans Pauli Strøm, landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum.

Tað er Anna Maria Joensen, sum hevur skrivað greinarøðina um viðurskiftini hjá deyðasjúkum, ið er grundarlagið undir kjakinum. Hon er 45 ár og ættað úr Havn. Í 1991 flutti hon til Danmarkar í lestrarørindum og kom heimaftur fyri sløkum tveimum árum síðani saman við manni og dóttur. Er útbúgvin innan úflutning í Herning og hevur starvast í bæði fiskivinnu og oljuvinnu. Seinni hevur Anna Maria Joensen lisið norðurlendskar bókmentir og mentan á Lærda Háskúlaunum í Helsinki, har familjan búði í sløk fimm ár. Komin aftur til Danmarkar læs hon bókmentafrøði sum høvuðsgrein og minnilutabólkar sum síðugrein á Lærda Háskúlanum í Keypmannahavn. Anna Maria Joensen, ið sjálv hevur royndir sum avvarðandi, sigur, at endamálið við greinarøðini er breiða út vitan og kunnleika um støðu teirra deyðasjúku, varandi sjúku og teirra avvarðandi. Samstundis at vísa á, hvat aðalmálið í norðurlondum um heildarhugsan, heildarviðgerð og umsorgan miðar eftir. Palliativur (linnandi, men ikki lekjandi) hugburður og umsorgan, sum hevur ment seg innan krabbameinsøkið burturav, er tað besta heilsuverkið kann bjóða varandi sjúkum. Henda sokallaða holistiska (heildarspekiliga) tilgongdin setir menniskjað sjálvt í miðdepilin og átti at verðið framd í verki fyri øll varandi sjúk í Føroyum, heldur Anna Maria Joensen.




*Anna Maria Joensen, ið hevur skrivað greinrøðina í Sosialinum 23., 26. og 27. mars, hevur sjálv roynt leiklutin sum avvarðandi at deyðasjúkum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

*Miðlahúsið er karmur um pallborðskjak um umstøður teirra deyðasjúku mikudagin 11. apríl klokkan 19*

FARMAKONOMAR

Apotekið í Havn søkir eftir trimum farmakonomum til fast starv at byrja 1. juli 2007.

Vit hava eisini brúk fyri farmakonomum til vikarstørv.

Umfram at hava lokið farmakonomútbúgvingina, hevur tað týdning, at tú hevur hug at starvast saman við nógvum fólki og hevur eitt opið sinni.

Apotekið avgreiðir umframt viðskiftafólk við diskin eisini Landssjúkrahúsið, handkeypssølur, læknar, tannlæknar, djóralæknar, depotir, skipskistur og røktarheim.

Umsókn við prógvum og møguligum ummælum skal sendast til:

TJALDURS APOTEK
R.C. Effersøesgøta
Postboks 3010
110 Tórshavn
www.apotek.fo

Eisini ber til at fáa meira at vita við at ringja á tlf. 341100 og spyrja eftir Jørgin ella Kristinu.
Umsóknarfreistin er 1. mei 2007

www.sosialurin.fo

**Pallborðskjak**
**í Miðlahúsinum**

**Mikukvøldið 11. apríl kl. 19.00**

**Evni: »Umstøður hjá deyðasjúkum í Føroyum«**
Uppfylging av greinarøð í Sosialinum
23., 26. og 27. mars 2007

**Luttakarar við pallborðið:**
**Jákup N. Olsen,** formaður, Sjúklingaráðið
**Kathrina Lindenskov Joensen,** sálarfrøðingur
**Mary J. í Garði,** stjóri, Nærverkið
**Marin Vang,** sjúkrarøktarfrøðingastjóri, Landssjúkrahúsið
**Erik Wandall,** yvirlækni, Landssjúkrahúsið
**Hans Pauli Strøm,** landsstýrismaður í almanna- og heilsumálum

**Møguleiki verður at seta spurningar til pallborðsluttakararnar**

miðlahúsið í Vágsbotni
Sosialurin